

## Petur Prent í Smiðjuni

Í gjár lat gøtumaðurin Petur Mikkelsen upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hann sýnir fram slíkt, ið hann minnist frá uppvøkstrinum í Syðrugøtu.

– Tað er serliga brimið, ið hevur fasinerað meg, sigur Petur Prent, sum leggur dent á, at alt er málað eftir minninum – einki málað eftir mynd. Framsýningin er opin frá 15-19 og er opin til týsdagin.


## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í VB-húsinum mánadagin 5. februar 2001 kl. 18.00.

Skrá smbrt. grein 6 í viðtøkum felagsins. Mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, eiga skrivliga at verða starvsnevndini í hendi í minsta lagi 8 dagar frammanundan.

**Vágs Bóltfelag**



LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING

## Lærlingur

**til Elding í Tórshavn**

Elding søkir eftir lærlingi til hvítvørudeildina í handlinum í SMS at byrja beinanvegin

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læripláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 1. februar 2001 og skal sendast til:

**Elding í SMS**
Postboks 1289
110 Tórshavn

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697


# Fossabrúgvin verður ikki breiðkað

**Eingin ætlan er um at gera ábøtur á Fossábrúnna í Vestmanna, so hon verður trygg at ferðast eftir hjá fólki og bilum**



FYRISPURNINGUR
*Magnus Dam*

Hóast hon er bygd í tríatiárunum og ikki er ætlað ferðsluni, sum er í dag, so er eingin ætlan um at breiðka Fossábrúnna í Vestmanna. Brúgvin er nóg góð sum er, heldur landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Bjarni Djurholm.

Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, hevur í einum fyrispurningi til landsstýrismannin spurt, nær brúgvin verður breiðkað og gongubreyt gjørd fram við vegnum frá brúnni og inn í bygdina. Jógvan Durhuus vísir á, at brúgvin er sera smøl og vandamikil hjá fólki, sum skulu til gongu eftir brúnni. Nógv ferðsla er á brúnni, og ikki er óvanligt at síggja fólk noyðast at skora seg upp móti rekkverkinum, tá akfør koyra eftir brúnni, sigur tingmaðurin í viðmerkingunum.

Brúgvin er landsvegur og sostatt ábyrgdin hjá Landsstýrinum. Skal hon breiðkast, er tað landsstýrismaðurin, sum skal taka avgerð um tað.

Men tað hevur landsstýrismaðurin onga ætlan um, sæst í svarinum til Jógvan Durhuus. Eingin peningur er settur av til ábøtur á brúnna, og skal hon breiðkast, má Løgtingið játta neyðuga peningin.

Landsverkfrøðingurin metir, at tað fer at kosta 1,2 milliónir krónur at gera gongubreyt við síðuna av brúnni og fram við vegnum inn í bygdina. Brúgvin sjálv eigur ikki at verða broytt, tí hon er gomul og vøkur, laðað úr gróti, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin er samdur í, at brúgvin ikki er egnað til fólk, sum eru til gongu, men hann heldur ikki, at hon beinleiðis er ein fløskuhálsur fyri ferðsluna á vegastrekkinum. Men verður vegurin inn móti bygdini breiðkaður, so eigur spurningurin um møguliga at breiðka brúnna at verða viðgjørdur av nýggjum, sigur landsstýrismaðurin.

# Norðurlandasamstarvið eingin kaffiklubbur

**Saman við hinum londunum í útnorði skulu Føroyar geva norðurlendska samstarvinum eina saltvatnsinnsprøning, sigur Høgni Hoydal í frágreiðing um norðurlendska samstarvið. Aðalorðaskifti verður um norðurlandamál í næstum**

NORÐURLANDAMÁL
*Magnus Dam*

- Eftir mínum tykki er tað púra skeiv tat siga, at norðurlensk samstarv bert er ein kaffiklubbur, har einki kemur á skaftið. Soleiðis tekur Høgni Hoydal til í frágreiðingini um norðurlandamál, sum hann legði fyri Løgtingið hósdagin.

Orsøkin til frágreiðingina er, at Løgtingið í næstum skal hava aðalorðaskiftið um framtíðar norðurlendska samstarvið. Tann sonevnda vísmannafrágreiðingin um norðurlendskt samstarv frameftir mælir til stórar broytingar í norðurlendska samstarvinum, og frágreiðingin verður støðið undir aðalorðaskiftinum í Løgtinginum.

Høgni Hoydal staðfestir í sínari frágreiðing, at gongdin í ES, Baltalondunum og Russlandi tykist fáa alt størri pláss í politiska huganum hjá teimum størru norðurlondunum. Samstundis tykist samstarvið millum Ísland, Grønland og Føroyar og eisini Norra, sum ikki er við í ES, at styrkna.

Vandi er fyri, at norðurlendskt samstarv brotnar av um tvøran, har ES-londini draga ein veg, meðan útnorðurlondini saman við Norra draga ein annan veg, sigur Høgni Hoydal. Hann leggur afturat, at tað tí er neyðugt, at útnorðurlondini geva norðurlendska samstarvinum eina saltvatnsinnsprænging.

### Fruktagott samstarv

Høgni Hoydal heldur, at Føroyar og hini norðurlondini hava fingið nógv burturúr norðurlendska samstarvinum. Gott samstarv er á mentanarliga økinum, politikkarar, stovnar og feløg samstarva og fáa nógv vitan hvør frá øðrum, sáttmálar eru gjørdir millum londini, sum tryggja borgarunum góð rættindi, sama hvørjum landi, teir búgva í ella ferðast til.

- Norðurlendska samstarvið er okkara besta portur út í heim, og kann enntá geva okkum allar teir fyrimunir, ið vit halda okkum fáa í danska ríkinum, sigur landsstýrismaðurin í norðurlandamálum.

Høgni Hoydal heldur, at Føroyar, Ísland, Grønland og Norra eiga at draga norðurlendska samstarvið í ein vstan, útnyrðin og norðan og samstarva meira við londini har. Samstarvið millum londini í Norðuratlantshavi kann gerast ein verulig styrki mótvegis ES og mótvegis gjónni, sum tykist vera millum norðurlond.

### Gera Føroyar sjónligari

Landsstýrið hevur sett sær fyri, gera Føroyar sjónligari í norðurlendska samstarvinum komandi árini. Føroyar skulu hava sjálvstøðugan limaskap og gjalda sjálvi. Sum er, hava Føroyar, Grønland og Áland ikki sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum.

Sum ítøkilig mál hevur landsstýrið milllum annað seg sær at fáa sett pening av á fíggjarlógini til norðurlandamál, at samskipa kunningina um norðurlendskt samstarv í Føroyum við serligum denti á ungdómsarbeiði og at styrkja um samstarvið millum londini í útnorðri og Norðuratlantshavinum.

Nógv av hesum, sum Landsstýrið hevur sett sær sum mál, samsvarar við tilmælini í vísmannafrágreiðingini, og Høgni Hoydal heldur, at Føroyar eiga at stuðla høvuðstonkunum í vísmannafrágreiðingini, sum mælir til, at umskipa og styrkja um samtarvið í Norðurlandaráðnum.

Tað er ikki greitt enn, nær Løgtingið fer at hava aðalorðaskifti um norðurlandamál.



Høgni Djurhuus, formaður í Siðseminevndini:

# – Alneyðugt við føroyskum biobanka beinanvegin

**Formaðurin í siðseminevnd heldur, at myndugleikarnir sum skjótast skulu seta á stovn ein føroyska biobanka, har allar upplýsingar frá føroyskari gengransking og aðrari mannagransking verður savnað. Soleiðis sleppa vit undan, at alt tilfarið verður sent av landinum og síðani fyribeint**



*Høgni Djurhuus, formaður í siðseminevndini, heitir á landsstýrið um at seta á stovn ein føroyska biobanka og ein granskingardepil, so at vit í Føroyum kunnu fara undir gengransking*

GRANSKING
*Stefan í Skorini*

Føroyingar skulu sjálvir varðveita og granska í genunum hjá føroyingum. Tíðin er komin, at landsmyndugleikarnir seta á stovn ein granskingardepil í Føroyum, har til ber at fara undir alt slag av mannagransking. Soleiðis slepst undan tí óhepnu støðu sum nú er, at øll gransking av føroyskum genum verður gjørd uttanlands.

Hetta heldur Høgni Djurhuus, sum seinasta árið hevur verið formaður í Vísindasiðseminevnd Føroya.

Tað skilst, at Almanna- og Heilsumálastýrið arbeiðir við málinum í løtuni, men enn er einki ítøkiligt komið fram haðani.

Høgni Djurhuus sigur, at siðseminevndin hevur fleiri ferðir gjørt landsmyndugleikunum vart við, at neyðugt er at arbeiða fram ímóti einum føroyskum biobanka, har alt mannalívfrøðiligt evni kann savnast.

Høgni sær onga forðing fyri, at slíkur banki kann setast á stovn í Føroyum, men tað er uppgávan hjá landsstýrinum at seta hetta í verk.

Sum nú er, verður alt slíkt tilfar forkomið, eftir at granskarar hava brúkt tilfarið í sínum arbeiði.

### Óheppið

Fortreytirnar fyri gengransking í Føroyum eru, at tey neyðugu tólini eru til taks hjá granskarum. Eingi slík tól eru í Føroyum í løtuni, og tað hevur við sær, at um granskarar ætla sær at granska gen hjá føroyingum, so mugu teir uttanlands at gera arbeiðið. Høgni Djurhuus sær vansar við hesum.

– Tað er ein vansi við, at granskarar mugu út um landoddarnar at kanna føroysk gen. Tað er sera óheppið, men neyðugt í løtuni, tí vit hava ikki tól til endamálið.

Tí heldur Høgni Djurhuus, at vit sum skjótast skulu seta á stovn ein føroyska data- og biobanka. Har skulu allar upplýsingar og kanningarúrslit verða goymd undir føroyskari lóggávu.

Siðseminevndin tekur í løtuni støðu til einstakar umsóknir frá granskarum so hvørt. Genkanningarnar verða gjørdar uttanlands, og blóðroyndirnar verða síðani fyribeindar.

### Lógin er nøktandi

Í Føroyum hava vit onga einstaka lóg, sum bara fevnir um gengransking. Fyri einum ári síðani var lóg samtykt í løgtinginum, sum fevndi um alla mannagransking yvirhøvur. Hetta var ein donsk lóg, sum varð lagað til føroysk viðurskifti.

– Vit hava í Føroyum sera strangar reglar viðvíkjandi gengransking, og eg haldi, at granskarar hava nóg góðar og greiðar karmar at virka undir. So leingi teir halda seg til galdandi lóg, sigur Høgni Djurhuus.

Høgni Djurhuus heldur, at vit eiga at granska í genum, tí tað týdningurin av hesum granskingarúrslitum kann vera stórur.

– Tað, sum vit vinna við at hava granskingina í Føroyum, er, at vit fáa eitt granskingarumhvørvi í Føroyum. Upplýsingarnar frá hesum granskingum eru eisini tryggari, um vit ansa eftir teimum her.

Tað harmar eisini nevndina, at granskarar ikki sleppa til verka, tá nevndin hevur givið loyvi, tí landsmyndugleikarnir ikki hava greiðar reglur um, hvussu granskingartilfeingið innan mannalívfrøðigliga gransking í Føroyum skal handfarast.

### Fíggjarligi vinningurin

Nógvur peningurin er gengranskingini, og tí er eisini umráðandi, at Føroya land fær ágóðan av tí peningaliga vinningi, sum er at fáa.

Siðseminevndin heitir tí á landsmyndugleikarnar um at hava í huga, at møguligur fíggjarligur ágóði kemur landi ella viðkomandi stovni til góðar.

Nevndin vónar eisini, at Almanna- og Heilsumálastýrið skjótt kann koma við einum úrsliti av teirra arbeiði á hesum økinum. Tí sum er minkar áhugin millum granskarar at arbeiða her.


## Útsølan byrjar mánadagin 22. januar kl. 10.00

| | Fyrr | Nú |
|---|---|---|
| Adidas gangiskógvar børn | 299,- | 199,- |
| Adidas renniskógvar | 799,- | 399,- |
| Adidas gangiskógvar | 599,- | 399,- |
| Adidas barnaskógvar | 449,- | 199,- |
| Nike barnaskógvar | 449,- | 199,- |
| Adidas babyjogger | 249,- | 150,- |
| Puma hettutroyggja | 399,- | 199,- |
| Adidas hettutroyggja | 399,- | 150,- |
| Adidas pant | 299,- | 100,- |
| Firefly blusa | 199,- | 100,- |
| Adidas polyesterdrakt | 499,- | 299,- |
| Taskir Color Kids | 199,- | 99,- |

og mong onnur góð tilboð

ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM
Tel. 44 73 99